Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Hjálparískoyti og hækkað familjuískoyti í 2023

Spurningar:

1. Hvussu nógv húski hava fingið hjálparískoyti sambært løgtingslóg um familjuískoyti?
2. Hvussu nógv av hesum eru húski við einum vaksnum og hvussu nógv húski hava fleiri vaksin?
3. Hvussu nógv húski hava fingið oljuískoyti sambært løgtingslóg um familjuískoyti?
4. Hvussu nógv húski fáa ágóðan av, at familjuískoytið er hækkað í løtuni?

Viðmerkingar:

Eitt tað fyrsta, samgongan tók stig til eftir valið í fjør, var at lætta um gerandisdagin hjá fíggjarliga sperdum familjum. Familjum, sum vóru illa raktar av ógvusligu príshækkingunum seinastu tíðina.

Ein eingangsupphædd á 12.000 kr. skuldi latast húskjum við lágari inntøku og ongum ognum av týdningi. Harafturat bleiv familjuískoytið hækkað við 750 kr. um mánaðin frá 1. juni til 31. desember 2023, soleiðis at barnafamiljur eisini fáa ein eyka fíggjarligan styrk.

Hjálparpakkin varð einmælt samtyktur 22. mars í ár. Freistin at søkja um hjálparískoyti var 30. juni 2023. Tí hesar spurningar.

Á Løgtingi, 11. september 2023

Liljan Weihe